# Eingin Yakin

**Størsta álopshóttanin hjá Sveis er ikki úttikin, tí dystarvenjingin ikki er í lagi. Hinvegin er 23 ára gamli Marco Streller fatur til reiðar at skjóta mál fyri føðilandið**

SVEIS
*Jákup Mørk*

Hóast Sveis framvegis verður styrkismett beint undir europeiska toppinum, so er einki at ivast í, at tað er eitt sterkt lið, sum leygardagin fer á vøllin á Svangaskarði.

VfB Stuttgart, Werder Bremen, PSV Eindhoven og enntá Arsenal eru millum feløgini, sum standa á visit-kortunum hjá einstøku spælarunum, og hetta í sjálvum sæs boðar frá eini ávísari góðsku á liðnum.

Í Sveis tykist spenningurin vera størstur um, hvussu tað fer at gangast hjá Marco Streller, tá hesin nú aftur fer í landsliðsbúnan. 23 ára gamli áleyparin, sum er sáttmálabundin í týska Stuttgart, var í seinastu undankapping besti málskjúttin hjá Sveis, men eitt beinbrot hevur í eitt ár hildið honum frá landsliðsfótbólti.


*Vinnur Sveis dystin leygardagin, so hava teir aftur lagt seg á odda í bólki fýra*

Hetta hevur viðført ein álopstrupulleika hjá sveisiska liðnum. Og tó at hesin trupulleikin ikki var so sjónskur móti Føroyum í Basel, so er hetta nakað, sum nógv hevur verið gjørt burturúr í sveisikum miðlum.

### Eingin Yakin

Sæð við føroyskum eygum, so er tað helst eitt sindur troystarkent, at Koebi Kuhn, landsliðsvenjari, ikki hevur tikið Hakan Yakin við á liðið hesaferð. 10'arin, sum í Basel tagaði føroysku verjuna fullkomuliga sundur, hevur havt sera ilt við at fáa spælitíð í nýggja felagi sínum, Galatasary, og tí hevur venjarin gjørt av, at dystarvenjingin til landsliðsfótbólt er ov lítil!

Sveis er annars framvegis við í oddastríðnum í okkara bólki. Higartil hevur talan verið um ein sera javnan bólk, har øll liðini - sæð burtur frá Føroyum og Cypern - hava víst seg at vera sera jøvn. Vinnur Sveis dystin á Svangaskarði leygardagin, so hava teir fyribils lagt seg á odda íbólkinum.

Sveisiska liðið sær annars soleiðis út:

Málverjar: Pascal Zuberbuehler (Basel), Fabio Coltorti (Thun), Sebastien Roth (Lorient)

Verjuspælarar: Philipp Degen (Basel), Ludovic Magnin (Werder Bremen), Patrick Mueller (Basel), Alain Rochat (Bern Young Boys), Philippe Senderos (Arsenal), Christoph Spycher (Grasshoppers Zurich)

Miðvøllur: Tranquillo Barnetta (Hanover), Ricardo Cabanas (Grasshoppers Zurich), Johann Lonfat (Sochaux), Johann Vogel (PSV Eindhoven), Raphael Wicky (Hamburg), Reto Ziegler (Tottenham)

Álop: Alex Frei (Rennes), Daniel Gygax (FC Zurich) Marco Streller (Stuttgart), Johan Vonlanthen (Brescia)

## Bussferð við 12. Manni

Sum vanligt er, tá føroyska fótbóltslandsliðið dystast, so ætlar føroyski 12. maðurin sær eisini at spæla við.

Fyri at fjølgast sum best við leikvøllin, skipar 12. maður eisini fyri felags upphiting og ferð inn á Svangaskarð, har landsliðið leygardagin skal takast við Sveis.

Sjálv upphitingin til dystin byrjar kl. 12, tá dyrnar á Café Natúr lata upp fyri 12. manni.

Kl. 14.30 verður so farið í bussarnar og inn á Svangaskarð, og einki er at ivast í, at venjing og upphiting til felagssang tá er á skránni.

Sagt verður, at tað helst verða einir 450 áskoðarar við mótstøðuliðnum, og tí ræður um hjá føroyska 12. manninum at vera bæði fjølment og væl fyrireikað.

-jm

# Stór rennikapping á Norðoyastevnu

**Eins og undanfarin ár, so skipar Ítróttafelagið Treysti fyri tí árligu Føroya Bjór Renningini á Norðoyastevnu**

RENNING
*Tíðindaskriv*

Hetta er 9. árið á rað, at runnið verður í miðbýnum. Luttøkan hevur verið sera góð síðani tað byrjaði, og er hon voksin hvørt ár, og hava umleið 150 rennarir luttikið seinnu árini. Í ár verður renningin leygardagin 4. juni. Rutan hjá børnum verður runt "Lítla Eið", tvs. at runnið verður eftir Skúlavegi, Gerðagøtu og Biskupsstøðgøtu. Rutan hjá teimum vaksnu verður tann sama sum seinasta ár, og tvs. at runnið verður runt "Stóra Eið". Tvs. eftir Skúlavegi, Gerðagøtu, Heygavegi, Nýggjavegi, Bøgøtu og Biskupsstøðgøtu. Teinurin er tó óbroyttur. Rennast skulu 3 1/2 umfar av hesi rutu. Tey vaksnu byrja í Bøgøtu uttan fyri KÍ-høllini, meðan børnini byrja uttanfyri Telefonstøðina har málið hjá øllum eisini verður. Rennikappingin er samstundis 2. umfar í Grand Prix kappingini. Skráin leygardagin sær soleiðis út:

| Kl. | Aldursbólkur | Teinur |
|---|---|---|
| 12.00 | Menn/Kvinnur (f. 1987 ella fyrr) | 5 km |
| 12.00 | Veteranar (f.1959 ella fyrr) | 5 km |
| 12.35 | Dreingir-7/Gentur-7 (f.1998 ella seinni) | 665 m |
| 12.45 | Dreingir-10/Gentur-10 (f.1995-1997) | 665 m |
| 12.55 | Dreingir-13/Gentur-13 (f.1992-1994) | 1.330 m |
| 13.05 | Dreingir-17/Gentur-17 (f.1988-1991) | 1.330 m |
| 13.15 | Firma-staffet (3 luttakarir, 1 umfar í part) | 665 m x 3 |
| 13.30 | Heiðursmerkjahandan | |

Fyri at telja við í endaligu Grand Prix støðuni, so skulu tey vaksnu hava verið við í minst 5 av teimum 6 kappingunum, meðan tað hjá børnum er minst 4 av teimum 6. FÍF hevur aftur í ár sett sum treyt, at fyri at kunna telja við í Grand Prix kappingini, so skal ein verða limur í einum av teimum fýra feløgunum fyri frælsan ítrótt: Treysti úr Norðoyggjum, Bragdið úr Havn, Roysnið úr Eysturoynni ella Frælsi úr Vágunum.

### Firma-stafettin

Aftur í ár verður skipa fyri "firma-staffet, sum er óbroytt tvs. at ongin "professionellir" rennari kann verða við, tvs. ongin sum hevur luttikið í 5 km frammanundan, kann verða við í staffettini. Tríggir luttakarir (menn/kvinnur) frá sama virki/felag renna eitt umfar, sum er 665 m, í part. Fyrsti luttakari á liðnum byrjar og rennur eitt umfar, næsti luttakari stendur klárur á málinum og fær eitt klapp frá tí fyrsta og rennur síðani avstað, triðji og seinasti luttakari stendur klárur og fær eitt klapp frá tí næsta og rennur síðani avstað og tá hann kemur á mál er alt liðið komið á mál. Tvs. at 3. maður er avgerandi fyri hvussu liðið klárar seg. Best er um teir 3 luttakarnir frá sama firma hava líka blusir at renna í - so tað verður lættari at halda skil á skiftum. Virkir, stovnar o.l. kunnu tilmelda eitt ella fleiri lið á tríggjar rennarir.



*Níggjunda árið á rað skipar Treysti fyri rennikapping á norðoyastevnu*

### Heiðursmerki og steyp

Heiðursmerki verða latin til nr. 1, 2 og 3 í øllum bólkum, og steyp verður latið skjótastu kvinnuni og manninum á 5 km teininum. Vinnandi stafett-liði fær steyp til ognar, umframt at nr. 1, 2 og 3 fáa heiðursmerkir.

### Tilmelding online

Aftur í ár verður tilmelding at fara fram online á heimasíðuni hjá FÍF, sum er www.athletics.fo . Freistin fyri onlinetilmelding er fríggjakvøldið 3. juni kl. 22.00. Luttøkugjaldið er kr. 50 fyri vaksin, kr. 20 fyri børn og kr. 150 fyri staffetlið. Startgjaldið kann flytast á konto 9865-101.947.8 ella gjaldast tá startnummarið verður avheintað. Tey sum tilmelda seg online, skulu avheinta startnummur við Telefonstøðina í góðari tíð áðrenn start. Eisini ber til, at tilmelda seg við Telefonstøðina, í seinasta lagi 1/2 tíma áðrenn renningarnar byrja, tá verður lagdar kr. 20 omaná vanliga startgjaldið. Allir luttakarir verða bidnir um, at møta við Telefonstøðina í góðari tíð áðrenn renningin byrjar.

Øll eru vælkomin at verða við, eisini tey sum ikki ætla at luttaka í Grand Prix, og vóna fyrireikarnir at undirtøkan verður minst líka góð sum hon hevur verið seinastu árini.